## Elbilar til SEV

Við Norrönu mánadagin komu tríggir Citröen C1 EVie elbilar, sum Elfelagið SEV hevur leigað til royndarkoyring í Føroyum. Citröen C1 EVie er ein vanligur Citröen C1, sum er umbygdur til elbil. Elmotorurin er upp á 30 kw ella 51 hk, og bilarnir kunnu koyra millum 80 og 100 km upp á eina løðing. Ætlanin er, at bilarnir skulu royndarkoyrast av einstaklingum, fyritøkum og stovnum fyrstu tríggjar mánaðirnar í nýggja árinum. Á myndini síggjast tveir elbilar, til uppløðing uttan fyri hjá SEV við Landavegin.



# Kambur er besti línubátur í ár

**Veiðitøl og avreiðingarvirði hjá línuflotanum í ár kunnu ikki samanberast við tey ár, tá hesin partur av flotanum hevði sínar bestu dagar**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Hóast Fiskimannafelagið ikki er liðugt við sína seinastu uppteljing í ár, og hóast allar avrokningar enn ikki eru komnar felagnum í hendi, er greitt, at línuskipið Kambur av Strondum verður bestur millum línubátarnar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Hóast endaligu tølini yvir, hvussu gingist hevur hjá fiskiflotanum í ár enn ikki fyriliggja, er tó greitt, at Kambur av Strondum verður bestur av línuskipunum. Í seinastu uppgerð hjá felagnum, sum er gjørd hálvan desember í ár, hevur Kambur fiskað 1.223 tons, sum eru seld fyri góðar 11,4 miljónir krónur.

Næst besti línubátur í ár er Eystnes, sum hálvan desember hevði fiskað 892 tons, sum eru seld fyri slakar 9,5 miljónir krónur.

Fleiri línuskip hava fiskað fyri millum 7 og 9 miljónir krónur, og millum hesi eru eitt nú Venus, Váðasteinur, Klakkur, Kvik, Mascot og Morgunstjørnan.

Hóast Fiskimannafelagið enn ikki hevur fingið allar avrokningar, er tó longu greitt, at eingin tekur Kamb, sum soleiðis bæði kemur at hava størstu landaðu nøgdina og størsta veiðivirði.

Hálvan desember í ár hevði Kambur havt 271 fiskidagar.

### Gongur betri

Tað hevur verið trupult hjá línuflotanum, síðan toskaveiðan minkaði niður í lítið og einki, samstundis sum lítið hevur verið at fingið av hýsu.

Í heyst hevur aftur verið meiri at fingið av toski, og útlitin hjá hesum parti av flotanum eru betri, enn tey hava verið í seinastuni.

Sambært Fiskimannafelagnum hava ikki so fáir túrar hjá línumonnum í heyst givið meiri enn minstuløn.

Árið 2003 var eitt sera gott ár hjá nógvum línuskipum, og hyggja vit at avreiðingarvirðinum hetta árið, finna vit helst línuskip, sum hetta árið fiskaðu fyri meiri enn 20 miljónir krónur.

Hetta var eisini eitt ár, har línuskip, sum høvdu loyvi at fiska á Føroyabanka, gjørdu nógvar heilt góðar túrar, samstundis sum bæði skip og manning tjentu nógvan pening.

Nú er so tíbetur líkt til, at línuflotin, sum hevur verið í djúpum aldudali, er á veg upp úr aftur.

## Smærri materiellir skaðar í hálkuni

HÁLKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hóast tað hevur verið rættilig hált um alt landið seinastu dagarnar, hevur ferðslan eftir umstøðunum gingið væl.

Tá Sosialurin tosaði við vakthavandi á politistøðini í Havn seinnapartin týsdagin, søgdu tey, at ferðslan hevur gingið yvirraskandi væl, sum tey málbóru seg.

- Nøkur smærri ferðsluóhapp hava verið kring um í landinum, mest á landsvegunum, men talan hevur bert verið um smærri materiellar skaðar.

Hendingin, sum man hava verið ein hin ógvusligasta, var, tá ein bilur, sum koyrdi á vegnum í Kaldbaksfirði, fór út av og endaði á takinum.

Løgreglan sigur, at fleiri fólk vóru í bilinum, men tíbetur fekk eingin nakran skaða.

- Aðrir bilar eru eisini farnir út av ella eru endaðir skeivir á vegnum, men eftir umstøðunum hevur ferðslan gingið væl. Fólk koyra sum heild varisliga, og tað ger, at eingin fólkaskaði hevur verið, eins og materiellu skaðarnir eru avmarkaðir, sigur vakthavandi.

Lagt verður aftrat, at rættiliga nógv ferðsla er, nú tað stundar til jóla, og síðan kavin legðist, hava fleiri fráboðanir verið um smærri materiellar skaðar um alt landið.

# Virkir farin í jólafrí

**Hamranes og Breiðanes landaðu upsa í Hvalba mánadagin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Tað hevur gingið óføra væl hjá partrolarunum, Hamranesi (mynd) og Breiðanesi, síðan suðuroyingar saman við øðrum keyptu skipini*

Partrolararnir Hamranes og Breiðanes landaðu í Hvalba mánadagin. Hetta var ein stuttur túrur. Skipini høvdu góð 105.000 pund av upsa tilsamans, sum TG Seafood keypti.

Magnus Jespersen, stjóri á Delta Seafood og á Sandoy Seafood, sigur, at virkini, sum hann hevur við at gera, verða liðug við fiskin í dag. Síðan verður farið í jólafrí, og lagt verður ikki til brots aftur fyrr enn fyrst í komandi ári.

Hann sigur, at tey á Sandoy Seafood hava arbeitt upsa, sum Polarhav og Stjørnan landaðu í Saltangará mánadagin, og eisini kom nakað av fiski úr Sørvági.

- Delta Seafood á Tvøroyri og TG Seafood í Hvalba hava í vikuni eisini arbeitt fisk, sum er landaður norðanfjørðs og er komin suður í trailarum, sigur Magnus Jespersen, stjóri á Delta Seafood og á Sandoy Seafood.